# Fyrsta FM í 16 ár er í eygsjón



*Mynd: Jens Kristian Vang*

**5-MANNAFØR DREINGIR** Við mest sannførandi sigrinum í hesi kappingini higartil í ár gjørdu vágsdreingir undan tveimum teimum seinastu kappingunum seg til FM favorittar

Tróndur Arge

Bara eina ferð hava vágsdreingir í Royndini Fríðu vunnið FM. Tað var í 1994 ella fyri sekstan árum síðani. Felags fyri teir sjey, sum nú manna Royndina Fríðu er, at teir ikki minnast, hvussu tað gekk fyri seg í 1994. Onkrir teirra vóru ikki føddir, og aðrir lógu tað summarið í barnavogni.

Í illfýsnu umstøðunum, sum valdaðu tíðliga seinnapartin leygardagin í Vestmanna, vunnu vágsdreingir kappingina millum 5-mannafør við dreingjum, og harvið løgdu teir seg á odda í FM kappingini. Talan er um tætta kapping, tí Blikur, sum hesa ferð var næstfremstur, er bara eitt stig aftanfyri.

At Royndin Fríða má roknast at vera FM favorittur kemst eisini av, at vágbingar hesar seinastu ferðirnar hava verið alt meiri sannførandi. Fýra tær fyrstu ferðirnar skiftust hesir báðir bátarnir um at vinna. Blikur vann í Klaksvík, Royndin Fríða í Hvalvík, Blikur á Skálafjørðinum og Royndin Fríða vann í Vági.

Hesa mannagongdina – at bátarnir vinna aðru hvørja ferð – gjørdi Royndin Fríða upp við í Vestmanna, og ikki bara tað. Sigurin hjá vágbingum á Fjarðastevnu var tann mest sannførandi, sum er vunnin í hesi kappingini í ár.

Munurin millum teir báðar fremstu var meiri enn tvey sekund. So stórur hevur munurin ikki verið hinar fýra ferðirnar.

Saman við Firvaldi av Tvøroyri og Bliki av Argjum fekk Royndin Fríða besta startin, og fyrstu løtuna var tað tætt og javnt. Tá ið málið var hálvrógvið sprakk Royndin Fríða eina bátslongd og meiri enn tað framum Firvald, sum var væl frammanfyri Blik. Støðurnar vóru rættuliga skiftandi, men Royndin Fríða varð ongantíð hótt frammi í oddinum.

Blikur megnaði at taka Firvald, men argjadreingir megnaðu einki at gera við Royndina Fríðu. Í FM kappingini er munurin millum Royndina Fríðu og Blik bara eitt stig, og hóast tíðarmunurin hesa ferð var størri, enn hann hevur verið, so kann ikki sigast annað, enn at FM kappingin framvegis er beinhørð!

*trondur@sosialurin.fo*

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Royndin Fríða | 04:51.09 |
| 2 | Blikur | 04:53.19 |
| 3 | Firvaldur | 04:57.17 |
| 4 | Svanur | 05:01.12 |
| 5 | Jallurin | 05:02.01 |
| 6 | Junkarin | 05:03.14 |
| 7 | Teistin | 05:04.21 |
| 8 | Sílið | 05:08.04 |
| 9 | Beinta | 05:14.08 |
| 10 | Havfrúgvin | 05:17.24 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Royndin Fríða | 33 |
| 2 | Blikur | 32 |
| 3 | Firvaldur | 19 |
| 4 | Svanur | 16 |
| 5 | Jallurin | 15 |
| 6 | Teistin | 14 |
| 7 | Sílið | 8 |
| 8 | Junkarin | 3 |




*Góð orsøk til smíl umborð á Teistanum, nú kósin til FM-heitið tykist púra bein*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Teistin á FM kós

**BARNARÓÐUR GENTUR** Genturnar á Argjum vunnu aftur í Vestmanna, og tá ið Spógvin endaði á fimta plássi ber tað við sær, at argjagentur eru sera nær FM heitinum

Tróndur Arge

Fyri fimtu ferð av fimm møguligum eydnaðist tað leygardagin argjagentum av vinna barnaróðurin. Sigurin var sannførandi, tí Teistin var meiri enn eina hálva bátslongd frammanfyri næsta bátin.

Største kappingarneytin hjá Teistanum hevur verið Spógvin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ. Merkisvert er tað, at Spógvin hesa ferð endaði afturi á fimta plássi – sjey sekund aftanfyri vinnarabátin. Tað ber við sær, at argjatgentur eru væl á veg ímóti FM heitinum.

Drekin endurtók annað plássið, sum hann vann í Vági, og triðja plássið hjá Beintu var besta úrslitið hjá miðvágsgentum í ár.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teistin | 02:33.19 |
| 2 | Drekin | 02:35.22 |
| 3 | Beinta | 02:38.10 |
| 4 | Fípan Fagra | 02:38.20 |
| 5 | Spógvin | 02:40.01 |
| 6 | Ørnin | 02:40.23 |
| 7 | Firvaldur | 02:42.16 |
| 8 | Sandingur | 02:44.05 |
| 9 | Svanur | 02:47.01 |
| 10 | Frúgvin | 02:53.01 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teistin | 35 |
| 2 | Spógvin | 24 |
| 3 | Drekin | 23 |
| 4 | Fípan Fagra | 21 |
| 5 | Ørnin | 13 |
| 6 | Jallurin | 11 |
| 7 | Beinta | 9 |
| 8 | Tambar | 2 |
| 9 | Svanur | 1 |
| 10 | Firvaldur | 1 |

# Drekin vann fyri fyrstu ferð

**BARNARÓÐUR DREINGIR** Kappingin millum tríggjar teir fremsta var óvanliga tøtt, tá ið Havfrúgvin kiksaði í heimasjógvi

Tróndur Arge

Tað hilnaðist ikki so væl hjá vestmannadreingjum, sum teir høvdu vónað, tá ið teir leygardagin í barnaróðrinum kappaðust á Fjarðastevnu í Vestmanna.

Á Jóansøku fyri einari viku síðani vann Havfrúgvin, sum annars hevði verið nummar tvey í trimum teimum fyrstu kappingunum. Hesa ferð var tað Drekin hjá Havnar Róðrarfelag, sum var fyrstur á mál. Hetta var fyrsta ferðin í ár, at Drekin vann hesa kappingina.

Talan var um óvanliga spennandi róður. Drekin var bara stóran stavnin frammanfyri Havfrúnna og Títling, sum fóru stavn um stavn um málið. Títlingur hjá Havnar Róðrarfelag vann tríggjar teir fyrstu róðrarnar í ár, og Títlingur er tískil fremstur í FM kappingini.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Drekin | 02:29.14 |
| 2 | Títlingur | 02:29.20 |
| 3 | Havfrúgvin | 02:29.20 |
| 4 | Teistin | 02:33.07 |
| 5 | Jallurin | 02:35.15 |
| 6 | Sandingur | 02:35.20 |
| 7 | Royndin Fríða | 02:36.04 |
| 8 | Junkarin | 02:36.10 |
| 9 | Frúgvin | 02:37.09 |
| 10 | Dúgvan | 02:39.11 |
| 11 | Heykur | 02:39.13 |
| 12 | Tambar | 02:40.08 |
| 13 | Hulda | 02:48.07 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Títlingur | 27 |
| 2 | Havfrúgvin | 24 |
| 3 | Drekin | 21 |
| 4 | Teistin | 16 |
| 5 | Jallurin | 13 |
| 6 | Royndin Fríða | 7 |
| 7 | Tambar | 3 |
| 8 | Sandingur | 2 |